Mannagongd

# Svimjiroynd SSF - Klárar tú 200m?

## Fyriskiparar

Rætt at skipa fyri hesi roynd, hevur Svimjisamband Føroya (SSF), limafeløg SSF, allir skúlar undir Undirvísingarstýrinum, og allar almennar svimjihallir í Føroyum. Onnur kunnu søkja SSF um loyvi.

## Svimjihylurin

Royndin skal gerast í svimjihyli har vatnið er í minsta lagi 17 og í mesta lagi 32 hitastig, har svimjarin fær svomið uttan at raka botn, og har tað eru í minsta lagi 12 metrar ímillum hvørja vending.

## Vitni

Royndin skal skipast soleiðis, at ein sum er minst 16 ár og køn/ur í hesi mannagongd, sær svimjaran svimja allan teinin. Vitnið eigur at vera SSF góðkendur lívbjargari, um ikki annar er til staðar.

## Útgerð

Svimjarin skal nýta vanlig svimjiklæðir ið ikki flóta munandi, tvs. t.d ikki vátdrakt ella búna við innbygdari flótihjálp. Svimjarin kann hartil nýta svimjibrillur og -hettu, og annars einki annað.

## Royndin

Svimjarin skal svimja teir 200 metrarnar uttan nevnivert íhald, og uttan at nerta við botnin. Allar svimjigreinar eru loyvdar. Svimjarin eigur at nerta við veggin í vending, tó gjarna bara til at stoyta frá.

Tað er ikki krav leypa útí - men um svimjarin vil geva sær sjálvum eina eyka avbjóðing, so eru harðari royndir við lopi útí, uttan brillur, við høvdinum uppúr og/ella rygg 50m, í klæðum og eftir dukku.

## Skráseting

Royndin skal skrásetast rætt í hesum oyðiblaði, og møguligt gjald fáast inn, áðrenn svimjinálin kann handast. Minstakrav er at fáa at vita, hvar ið royndin varð klárað, alt hitt má vera upp til svimjaran, um hann ella hon ynskir at fáa hetta ymiska skrásett: https://form.jotform.com/212424612200033

ATLANTIC AIRWAYS